

Ein føroyskur útbúgvingarpolitikkur innan oljuvinnu eigur at vera settur í hásæti, sigur Oljuráðleggingarnevndin

# Oljuútbúgving skal til

**Løgmaður fegnast í løgmansrøðuni um frágreiðingina frá Oljuráðleggingarnevndini. Løgmaður tekur undir við, at dentur skal leggjast á holla oljupolitiska vitan áðrenn oljuleitingin kann byrja.**

LEIF LAADAL

Hvussu skal hendan oljuvitan so fáast? Í frágreiðingini verður skrivað eitt sindur um tær kanningar, ið eru framdar í Noregi, Danmark, Hetlandi, Grønlandi og Skotlandi. Nevndin skrivar nógv um tær norsku royndirnar og tað framgongur, um ikki beinleiðis, at tann føroyski oljupolitikkurin eigur at verða skipaður á nakað sama hátt sum tann norski.

### Krøv til tey ið leita

Útbúgving og eftirútbúgving er av alstórum týdningi. Nevndin hevur í hesum sambandi gjørt eitt yvirlit yvir teir fakbólkar ið tørvur væntandi verður á í teimum ymisku tíðarskeiðunum. Tey trý skeiðini talan er um, eru leitiskeiðið, útbyggingarskeiðið og framleiðsluskeiðið. Umsiting, bæði almenn og privat, er við í øllum trimum skeiðum. Tað sama er galdandi við tænastum. Anleggsvirksemi og avleitt virksemi er ikki við í tí fyrsta skeiðinum.

Á teimum útbúgvingum, ið eru listaðar, sæst, at stórur tørvur verður á samfelagsfrøðingum, teldutænastum og tryggingartænastum. Aðrar tænastur, sum stórur tørvur verður á, eru umhvørvisfrøðingar, sjúkra- og heilsurøkt og sakførarum.

Ungfólk og onnur eru longu byrjað at leita eftir útbúgvingum, ið hava við oljuvinnu at gera, men nakar beinleiðis føroyskur oljuútbúgvingar-politikkur er ikki komin í gongd enn. Hetta kann vera gjørt við til dømis at seta krøv til tey feløg ið søkja um loyvi at leita eftir olju rundan um Føroyar. Millum annað kann vera kravt, at oljufeløgini halda skeið og evnislestrar í Føroyum, gera studningar fyri lesandi føroyingar, stuðla føroyskum útbúgvingarstovnum, lata undirvísingarútgerð og seta í verk, taka lut í og fíggja granskingar- og menningarvirksemi í Føroyum.

### Lokka undirvísarar við skattalætta

Í Noregi byrjaði oljuundirvísingarpolitikkurin longu í 70-unum. Stórur tørvur var á lærarum og millum annað lokkaðu norðmenn útlendingar til landið við at bjóða teimum tvey skattafrí ár. Eisini blivu norðmenn stuðlaðir fíggjarliga, so leitast kundi út um landið at vinna sær útbúgving og royndir innan oljuvinnu.

Úrslitið sást skjótt. Longu 10 ár eftir at fyrsta oljan varð funnin sótu norðmenn við royndum úr sjó- og fiskivinnu í 9 av 10 størvum, ið bóru sjóvinnuligt brá.

Hvussu útbúgvingarnar innan olju skulu skipast í Føroyum, sigur nevndin einki beinleiðis um. Í frágreiðingini verður skrivað um tveir møguleikar. Antin skula vit fólk her á landi ella verða tey send uttanlands. Um ein grundútbúgving av einum ella øðrum slag var í Føroyum, so kundi næmingurin farið uttanlands at tikið serútbúgvingina. Afturat hesum er sjálvandi eisini møguleikin at taka alla útbúgvingina uttanlands. Fyrimunurin við at taka alla útbúgvingina uttanlands er, at fólkið fer at hugsa altjóða og at hesin mátin at skipa útbúgvingar er biligari. Fyrimunurin at hava útbúgvingarnar í Føroyum er, at tað stuðlar undir eitt fakligt umhvørvi í landinum.

# Danir sinnaðir fyri ríkisfelagsskapi við Føroyar

**Ein donsk veljarakanning um, hvørja støðu danir hava til ríkisfelagsskapin við føroyingar og grønlendingar er nú almannakunngjørd. Kanningin vísir greitt, at flestu halda at felagsskapurin millum hesi trý londini er til gagns fyri danir, eins væl og hann er tað fyri hinar partarnir.**

SNORRI BREND

– Eg er sera fegin um hesi tølini. Tey vátta bert verandi støðu. Sjálvandi hava vit ábyrgd fyri, hvussu tað gongst teimum londum, sum vit senda so stórar peningaupphæddir til. Men best er sjálvandi, um tey sjálvi finna loysnir á trupulleikunum.

Sjálvan ólavsøkudag almannakunngjørdi danska blaðið »Politiken« eina kanning, sum m.a. skuldi lýsa, hvørja støðu danir hava til ríkisfelagsskapin við føroyingar og grønlendingar.

Kanningin vísir greitt, at tey flestu av teimum 953 spurdu halda, at felagsskapurin millum hesi trý londini er til gagns fyri danir, eins væl og hann er tað fyri hinar partarnir.

Danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen fegnast sum vera man um úrslitið. Men í Politiken leggur hann tó dent á:

– Vit eiga framhaldandi at lurta eftir føroyingum og grønlendingum. Vit mugu fylgja væl við gongdini, og ansa eftir »koloni-holdningum«.

Tað er Vilstrup-stovnurin sum gjørt hevur hesa kanningina, sum varð gjørd stutt undan vitjanini hjá drotning Margretu og fylgi hennara í Føroyum í hesum døgum.

Eingin ivi tykist vera um, at millum danir ríkisfelagsskapurin er ein sjálvsagdur lutur og veruleiki í politiska landslagnum, sum lítið orðaskifti er um.

### Danskir myndugleikar vísa vantandi virðing

Men í kanningini verður kortini víst á, at ein fjórðingur av teimum 953 spurdu ikki hava gjørt sær eina meting um hetta málið. Hetta harmar formannin í Vinstra-flokkinum, Uffe Ellemann-Jensen almikið.

Við blaðið sigur hann, at ein kann bera ótta fyri, at nógvir danir meta ríkisfelagsskapin sum nakað sjálvsagt – sum eitt, ið ikki er neyðugt at hugsa um ella taka støðu til.

– Tíverri hevur stjórnin hjálpt væl til í so máta, við at vísa vantandi áhuga ella virðing fyri felagsskapinum á týdningarmiklum økjum, sigur Uffe, og vísir her til Føroyabanka-málið og viðferðina av grønlendska heimastýrinum í tosinum um kjarnorkuna.

Uffe vísir á, at tørvur er á nógv størri donskum, politiskum skyldum í ríkisfelagsskapinum. Annars er vandi fyri, at tað kóðnar í líkasælu.

### Kekkar í hópatali uttan endamál

Aðrir danskir politikkarar hava sagt frá hugsan síni um ríkisfelagsskapin, nú kanningin er vorðin kunnug fyri almenninginum.

Per Stig Møller úr Konservativa Flokkinum hevur áður skotið upp at hava ein árligan fund millum tinglimir úr øllum trimum londunum, soleiðis at ein kann styrkja felagsskapin.

– Her var so møguleiki í friði og náðum at tosa um trupulleikarnar, og kanska loysa onkran teirra, sigur hann.

Kirsten Jacobsen úr Framburðsflokkinum er tó munandi meiri hvassorðað enn Per Stig Møller. Hon sigur bart út, at danir ikki longur eiga at skriva út kekkar og loysa teymarnar.

– Hetta er ein líkasæla, sum mær als ikki dámar. Tá vit lata pening, hava vit eisini rætt til eftirlit av, hvussu teir verða brúktir. Tað, eg dugi at síggja, eru tað ikki tey veikastu í Føroyum og í Grønlandi, sum fáa gagn av teimum, sigur framburðskvinnan.

### Grønland og nútíðin

Grønlendingar eru ikki serliga bilsnir av positivu hugsanini í hesi seinastu kanningini um ríkisfelagsskapin. Hans Pavia Rosing úr Siumut-flokkinum, sum er óalmennur ráðgevi í grønlendskum málum hjá Poul Nyrup Rasmussen sigur við blaðið:

– Eg havi varnast hetta, tí eg eri so nógv í Danmark. Eg havi eisini verið úti fyri, at danir føla ringa samvitsku mótvegis Grønlandi. Men áttu vit framhaldandi at verðið verandi í fortíðini, sum djóragarður ella forngripasavn?

– Grønland hevur flutt seg mótvegis nútíðini eftir bert 30-40 árum, og tí er greitt, at hetta kann geva trupulleikar, sigur hann.

Hansara fatan er somuleiðis, at danir, sum fara til Grønlands nú á døgum, eru veruliga áhugaðir í landinum. Teir fara ikki bert hagar at vinna sær pening.

– Sjálvandi finnast enn smáir kongar, sum í Danmark bert vórðu mettir sum hovgekkar. Men samanumtikið er munandi størri virðing í dag fyri Grønlandi.



Formannin í danska Vinstra-flokkinum, Uffe Ellemann-Jensen sigur, at ein kann bera ótta fyri, at nógvir danir meta ríkisfelagsskapin sum nakað sjálvsagt – sum eitt, ið ikki er neyðugt at hugsa um ella taka støðu til. – Tíverri hevur stjórnin hjálpt væl til í so máta, við at vísa vantandi áhuga ella virðing fyri felagsskapinum á týdningarmiklum økjum, sigur Uffe, m.a. við føroyska bankamálinum



Vibeke Larsen, ríkisumboðskvinna sigur veljarakanningar vísa, at ein fjórðingur av føroyingum ynskja sjálvstýri. Men tá atkvøtt verður við løgtingsval er hesin fjórðingurin minkaður heilt niður í 13%

# Ríkisfelagsskapurin er ein sjálvfylgja

**– Ríkisfelagsskapurin millum Føroyar og Danmark er ikki eitt týðiligt kjakevni í føroyskum politikki, sigur ríkisumboðskvinnan, Vibeke Larsen í viðmerking.**

SNORRI BREND

Í hesum døgum vitjar Margreta drotning og fylgi hennara í Føroyum. Ein natúrligur persónur í hesum samanhangi er ríkisumboðskvinnan, Vibeke Larsen.

Politiken hevur somuleiðis biðið hana um viðmerkingar til úrslitið av kanningini hjá Vilstrup um ríkisfelagsskapin. Hon sigur:

– Ríkisfelagsskapurin er ein sjálvsagdur lutur hjá flestu føroyingum, hóast ein fjórðingur av teimum spurdu, í øðrum kanningum, ynskja sjálvstýri.

Vibeke Larsen leggur tó afturat, at tá atkvøtt verður við løgtingsval er hesin fjórðingurin minkaður heilt niður í 13%.

– Tað er fatan mín, at ríkisfelagsskapurin ikki er eitt týðiligt kjakevni í føroyskum politikki, sigur ríkisumboðskvinnan at enda í viðmerkingum sínum.

# 20-2 til hinar

**Føroyingar halda seg framat í altjóða fótbóltskappingum, men illa gongst at fáa nakað líkinda úrslit burturúr. Í teimum fýra dystunum, sum GÍ og KÍ hava spælt hesa seinastu vikuna, varð tað til eitt samlað tap uppá 20-2.**

LEIF LAADAL

Úrslitið hjá KÍ ímóti Ypesti Budapest á Svangaskarði mikukvøldið var heilt gott. Eitt lítið tap og frammanfyri tvær ferðir. Dysturin endaði 3-2 til Budapest - tað vóru Olgar Danielsen og Kurt Mørkøre, sum skutu málini hjá KÍ.

Í Glasgow gekk ikki so væl hjá GÍ. Nærum 50.000 áskoðarar sóu teirra Rangers vinna 6-0. Samanlagt tapir GÍ 11-0 og KÍ stendur samanlagt við einum tapi uppá 9-2.

### Hví vera við?

Sjálvt um dystirnir hjá GÍ vóru í einari undankapping til Champions League, so vísir úrslitið, at langt er á mál, um hugsingur skal vera um at gera seg galdandi í tílíkari kapping. Bara tað at sleppa víðari til fyrsta umfar er eitt ódnartak. Skulu tey føroysku liðini taka lut í tílíkari kapping? Tað skulu tey óiva, men spurningurin er, um tað ikki er til meira skaða enn gagn. Menn koma aftur úr útlondum við einum so stórum tapi, at tað tekur fleiri vikur at fáa teir uppá fótbóltssálarliga rættkjøl. Túrurin uttanlads vísti spælarunum, at teir kanska kunnu brúkast her á klettunum, men har úti hava teir einki at gera. Dreymurin um eitt uppihald í einum donskum aðrudeildarfelag er farin í sor.

Vit eru við fyri at læra! Tað plagar at vera niðurlagið. So er spurningurin, hvussu leingi vit tíma at hoyra um hendan lærdóm í longdini. Kanska áttu føroysk fótbóltslið at leitað sær eftir øðrum kappingum enn teimum stóru. Um leikur gongur sum hann gongur, so verður ikki leingi áðrenn føroysku liðini renna eftir bóltinum uttan at nakar áskoðari stendur rundanum vøllin og heppar. Fólk vilja hava eitt hampuligt úrslit av og á. Ikki bara tvey mál tá ið hinir fáa niggju.

### Øll eru vit serfrøðingar

Tað góða við fótbóltinum er, at hann er rundur. Tá ið tú ikki tímir at hava nakað at gera við hann longur, so er bert at sparka til hann. Hetta eru føroyingar í ferð við. Áskoðararnir eru ikki so talsterkir longur. Landsdystir, fyrstudeildardystir og steypafinalur samla ikki meira enn nøkur hundrað fólk. Fótbóltsleiðarar áttu at sæð ávaringartekinini. Okkurt má gerast við kappingarskipanina. Ikki bara broyta nøkur sekund her og nakrar rangstøðusentimetrar har. Føroyskur fótbóltur er tað, hann er, og so má støða takast út frá tí. Vit eru ikki stórir í hesi rundu leðurverð, so tíðin er komin, har vit áttu at funnið okkum nakrar javngamlar at spælt við.



Kurt Mørkøre skjeyt eitt av teimum tveimum málunum, sum KÍ fekk ímóti Budapest, men hvat nyttar tað tá ið hinir fáa niggju